# Sólarn skal stýra Mentanarhúsinum

**– Eg eri ótrúliga spentur at fara undir hesa uppgávuna. Hetta er veruliga nakað, sum eg brenni fyri, sigur Sólarn Solmunde, nýggjur leiðari fyri Mentanarhúsið í Fuglafirði**



*– Enn kann eg einki ítøkiligt lova, tí fyrsta má eg seta meg inn í alt, men eg haldi, at tað ber til at hava tiltøk og vinna pengar uttan bara at satsa upp á ein stóran dans einaferð um vikuna. Tað eru sjey dagar í vikuni, og tað eigur at bera til at hava meira reguligt virksemi í húsinum, sigur Sólarn Solmunde*

MENTAN
*Eyðun Klakstein*

Tað verður ein gøtumaður, sum skal leiða mentanarhúsið í Fuglafirði framyvir. Nevndin í Fuglafjarðar Sjónleikarfelag, sum eigur og rekur Mentanarhúsið, hevur gjørt av at seta Sólarn Solmunde sum leiðara fyri húsið.

– Sólarn er ein eldsál í føroyska mentanarheiminum, og hann hevur nógvar royndir at skipa fyri tiltøkum, sigur nevndin sum grundgeving fyri at seta hann í starvið.

Sólarn er kendur frá eitt nú tónleikafelagnum Grót, sum hevur skipað fyri nógvum tiltøkum seinastu árini, og hann hevur verið ein av grundstuðlunum undir G! festivalinum, sum hevur verið í Gøtu seinastu tvey árini.

### Tað koma óvart á

Sólarn Solmunde er longu farin til arbeiðis, og tá vit hittu hann í telefonini fyri middag fríggjadagin, var hann staddur í Fuglafirði.

– Eg eri glaður fyri at eg fekk hetta starvið. Tað kom eitt sindur óvart á meg, at eg skuldi fáa tað, men eg eri ótrúliga spentur at fara undir hesa uppgávuna. Hetta er veruliga nakað, sum eg brenni fyri, sigur hann.

– Føroysk mentan og føroysk list eigur eitt stórt pláss í mínum hjarta, og eg vil virka fyri, at tað verður fjølbroytt mentanarligt virksemi í húsinum framyvir.

### Regluligt virksemi

Sólarn Solmunde hevur sett sær sum mál, at tiltøkini og virksemið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði skal vera meira fjølbroytt framyvir.

– Enn kann eg einki ítøkiligt lova, tí fyrsta má eg seta meg inn í alt, men eg haldi, at tað ber til at hava tiltøk og vinna pengar uttan bara at satsa upp á ein stóran dans einaferð um vikuna. Tað eru sjey dagar í vikuni, og tað eigur at bera til at hava meira reguligt virksemi í húsinum, sigur hann.

Sólarn hevur tikið seg úr nevndini í Grót, har hann var ein av høvuðsmonnunum, og hann verður ikki oddamaður fyri G! festivalin, nú hann er farin í starvið í Fuglafirði.

Leygardagin klokkan 15.00 verður almenn móttøka fyri nýggja leiðaranum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

J. Bronckgøta 37 · Postboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.com

NÝGGJA FERÐAÆTLANIN HJÁ NORRÖNU
Eftir 10. januar 2004 sær vetrarferðaætlanin hjá Norrönu soleiðis út:

| Havn | Dagur | Koma | Frá farið | Januar | | | | Februar | | | | Mars | | | | April | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hanstholm | Leygardag | 11.00 | 16.00 | 10 | 17 | 24 | 31 | 07 | 14 | 21 | 28 | 06 | 13 | 20 | 27 | 03 | 10 | 17 | 24 |
| Bergen | Sunnudag | 06.00 | 06.30 | 11 | 18 | 25 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 | 07 | 14 | 21 | 28 | 04 | 11 | 18 | - |
| Lerwick | Sunnudag | 16.30 | 17.00 | 11 | 18 | 25 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 | 07 | 14 | 21 | 28 | 04 | 11 | 18 | - |
| Tórshavn | Mánadag | 06.00 | 17.00 | 12 | 19 | 26 | 02 | 09 | 16 | 23 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 | 05 | 12 | 19 | - |
| Seyðisfjörður | Týsdag | 09.00 | - | 13 | 20 | 27 | 03 | 10 | 17 | 24 | 02 | 09 | 16 | 23 | 30 | 06 | 13 | 20 | - |
| Seyðisfjörður | Mikudag | - | 18.00 | 14 | 21 | 28 | 04 | 11 | 18 | 25 | 03 | 10 | 17 | 24 | 31 | 07 | 14 | 21 | - |
| Tórshavn | Hósdag | 13.00 | 20.30 | 15 | 22 | 29 | 05 | 12 | 19 | 26 | 04 | 11 | 18 | 25 | 01 | 08 | 15 | 22 | - |
| Lerwick | Fríggjadag | 08.30 | 09.00 | 16 | 23 | 30 | 06 | 13 | 20 | 27 | 05 | 12 | 19 | 26 | 02 | 09 | 16 | 23 | - |
| Bergen | Fríggjadag | 21.00 | 21.30 | 16 | 23 | 30 | 06 | 13 | 20 | 27 | 05 | 12 | 19 | 26 | 02 | 09 | 16 | 23 | - |



Danland er vorðið eitt hitt best umtókta ferðamálið hjá føroyingum, og ikki er tað heldur so løgið.
Danland frítíðardeplarnir hava væl innrættaðar íbúðir við køki og nógv frítíðartilboð eru fyri bæði vaksin og børn.
Stanrars heimasíðuna www.danland.dk.

1 vika í Danland-íbúð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili

1 vika í Danlandi 5.995,-
Íroknað er: ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari við wc/bað, innv. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku í Hirtshals, Blokhus ella Ebeltoft í tíðarskeiðinum 01.01.04-27.03.04





April 2004
1 vika í Danlandi 6.995,-
Íroknað er: ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari við wc/bað, innv. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku í Hirtshals, Blokhus ella Ebeltoft í tíðarskeiðinum 01.04.04-15.04.04



2 fyri 1 til Hanstholm 2.990,-
Ferðist tvey (innv. 2-koyggjukamari við wc/bað) í leiðini Tórshavn-Hanstholm og aftur og gjaldið fyri ein.

2 fyri 1 til Bergen 2.380,-
Ferðist tvey (innv. 2-koyggjukamari við wc/bað) í leiðini Tórshavn-Bergen og aftur og gjaldið fyri ein.

2 fyri 1 til Lerwick 1.790,-
Ferðist tvey (innv. 2-koyggjukamari við wc/bað) í leiðini Tórshavn-Lerwick og aftur og gjaldið fyri ein.

2 fyri 1 til Seyðisfjörð 2.200,-
Ferðist tvey (innv. 2-koyggjukamari við wc/bað) í leiðini Tórshavn-Seyðisfjørður og aftur og gjaldið fyri ein.

Barnavinarlig Noregsferð
1 vika á Pers Hotel - 2 vaksin, 2 børn og bilur
Pers Hotel er ein av teimum fáu frítíðardeplunum í Noregi, ið hava baðiland. Døpilin við baðismáttum og íbúðum liggur í tilvbera vakra Gol-økinum. Sera barnavinarligt við einum hópi av frítíðarmøguleikum. Koyritíðin frá Bergen er einar 4-5 tímar.





1 vika á Pers úr 6.000,-
Íroknað er: Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari innv. við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost og 2 gistingar í Bergen á út- og heimferðini.

1 vika í summarhúsi í Easterhoull í Hetlandi
1 vika úr 4.500,-
Íroknað ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur

4 fólk í bili til Geilo
8 tímar at koyra bil frá Bergen
Í samband við at vit sigla til Noregs allan veturin, fara vit at bjóða ferðandi framúr góð tilboð um skíferðir til Noregs.



Skíðaferð til Noregs fyri 4 fólk í bili við uppihaldi

1 vika í Geilo 11.600,-
Íroknað ferð fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari v. wc/bað innv., yvirnátting 7 nætur í íbúð á Geilo Apartment í Geilo og 2 nætur í Bergen á út- og heimferð.

SMYRIL LINE

Vikuskifti

Nr. 243 • leygardagur • 20. desember 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Harvard og Yale: Skulu altíð vera best

Stríðið millum Harvard og Yale er væl kent í USA, og nógv fólk kenna tað frá amerikanskum Hollywood-filmum. Men hvussu er hetta "stríðið" í veruleikanum?
Hans Kárason Mikkelsen skrivar av Harvard

Lesið síðu 5



# Sæl eru tey

Men spaklyntir skulu fá landið í ogn; fegnast av ríkari lukku, stendur í sálmaørindinum, sum víst verður til í fjallaprædikuni. Og jørðin kring fjallið, har prædikan varð hildin, kann í dag av sonnum sigast vera verd at eiga, um sæð verður burtur frá kioskum og ruskdungum, sum allastaðni fylgja menniskjuni í dag

HUGLEIÐING Í GALILEU
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Tey hava nakað at fegnast um, sum í dag hava fingið hesa jørðina í arv, soleiðis sum sagt varð teimum frá hesum staðnum fyri umleið 2.000 árum síðani.

Tað er ikki líkt til, at landið var so ríkt tá, sum tað er í dag, hóast tað man hava verið á góðari leið tá eisini. Men tá á døgum skuldi eitt undur til at metta øll tey fólkini, sum komu at hoyra hendan mannin, sum hevði nøkur skilagóð boð at bera teimum. Tó at tað hendi í grannalagnum nakað seinni.

Men her stóðu tey so. Lærumeistarin og øll tey, sum komin vóru at lurta eftir honum. Á hesum staðnum, vilja søgurnar vera við, at tað hendi.

Sum so manga aðrastaðni, har slíkar heningar eru farnar fram - og heilt nógva aðrastaðni eisini - hava fólk so í góðari meining bygt kirkjur og kapel at vísa til hesar stórhendingarnar, sum fyri teimum eru tær størstu. Eisini her á fjallinum, sum prædikan varð hildin, er kirkja reist til minnis um ta hendingina.

Og her koma ferðafólk. Pílagrímar, sum fegnir vilja vitja staðið og helst eisini uppliva eitt sindur av tí anda, ið teir ivaleyst meta, enn má liggja yvir tí.

Men eisini tey, sum vilja selja, eru komin higar. Eins og í templinum á sinni verður alt møguligt boðið til fals til hesi, sum í síni trúgv eru komin at vitja hetta kenda stað.

Her er kiosk beint uttan fyri kirkjuna, har til ber at keypa sólhattar og kaffibønir, súltað kirsuber og skotskt whiskey umframt ein hóp av øðrum eftir egnum ynski.

Tey høvdu í dag kanska ikki havt fyri neyðini at leitað sær til Tabgha, her beint niðanfyri, at metta seg av breyði og fiski.

Og soleiðis er allastaðni, har eitthvørt, sum vísast kann aftur til heilagu skriftirnar, er farið fram. Ein ørgrynna av fólki, sum vil selja líkt og ólíkt, sum sigst at hava eitthvørt samband við staðið ella í besta føri við hesa ávísu hendingina.

Mangan hevur verið tikið til, at Jesuspápin er ofta seldur, men at bara Judas var so frægur, at hann angraði tað og tók avleiðingarnar av sínum handli. Nógv eru tey, sum seinni hava selt hann meira enn eina og tvær ferðir fyri egnan vinning, og halda væl til standa. Og soleiðis er eisini her í landinum, har hann gekk og gjørdi væl. Í dag verður víst til hansara at kalla allastaðni, har tú kemur fram. Men tá farið verður nærri at hesum, sum sita soleiðis, er kunnleikin um mannin mangan sera lítil.

Sæl eru tey spaklyntu, tí tey skulu fáa jørðina í arv.

Og ivaleyst hevur hann hugt oman at vatninum og sæð lendið ligið fyri sær vakurt og fruktargott, eins og tað er í dag. Tó ikki við plastposum bundum um bananirnar í lundunum niðanfyri, uttan bylgjandi økrum, sum bíðaðu eftir at verða skornir og gjørdir til tað breyð, sum hann fekk at røkka so væl, á eini seinni samkomu her beint niðanfyri.

Tað er hugtakandi og vakurt at hyggja oman av fjallinum og oman at vatninum.

Men tey, sum hava fingið jørðina í arv, hava helst ikki røkt hana eftir teirri ætlan, Meistarin tá hevði. Í hvussu er ikki, um vit taka ruskdungan við, sum liggur opin beint niður við kirkjugarðinum. Óvist, um tey tá høvdu verið prísað sæl, sum ábyrgdina hava av hesum.